

*Seat Bocanegra Concept við eyðkendum Seat-stíli*



*Nýggjar sportligar linjur frá Seat*



*Seat Bocanegra Concept innan, einfalt og smart*

# Nýggi Seat Ibiza



*Konseptbilurin Seat Bocanegra Concept verður avloysarin hjá núverandi Seat Ibiza*

**Konseptbilurin Seat Bocanegra Concept, sum verður frumsýndur á bilaframsýningini í Genéve, verður avloysarin hjá núverandi Seat Ibiza**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Seinastu árini er sponsku Seat komnir á marknaðin við rættuliga nógvum nýggjum modellum. Komandi ár er tað Seat Ibiza, sum stendur fyri tørni at vera skiftur út.

Avloysarin hjá Ibiza verður sýndur fram á bilaframsýningini í Genéve sum konseptbilurin Seat Bocanegra Concept. Talan er um ein sermerktan sportligan bil, ið líkist hinum Seat modelunum, sum eru á marknaðinum.

Tað er nýggi designstjórin hjá Seat, Luc Donkervolke, sum hevur ein fortíð hjá Lamborghini, ið hevur staðið fyri designinum.

Seat Bocanegra Concept hevur 1,4-litra TSI-motor og nýggja 7-trins DSG-girkassan hjá VW. Umframt tað hevur bilurin glastak, lágprofil hjól við dekkstøddini 235/35-19 og innbygda bluetooth-telefon og nógva aðra framkomna útgerð.

Nýggi Seat Ibiza kemur á marknaðin seinni í ár sum hatchback, og í 2009 kemur sedan útgávan.

---

# Seat nýggjheitir í 2009




*Seat Tribu verður ein sponsk útgáva av VW Tiguan*

Seinastu árini hava Seat, sum hoyra til VW-konsernina, arbeitt við verkætlanum um fleiri heilt nýggj modell, sum t.d. Tribu, sum er ein SUV, ið verður ein sponsk útgáva av VW Tiguan, og ein sedan í somu støðd sum Audi A4, ið ið væntandi verður klárur næsta ár. Hesin verður samstundis tann størsti í persónbilarøðini hjá Seat.



*Nakað soleiðis kemur ein Seat sedan í støðd við Audi A4 at síggja út*